

Martin Joensen er føddur 27. august í 1953 í Vestmanna. Martin gekk í skúla í Vestmanna, har han tók realprógv í 1970. Hann tók studentsprógv í 1973 og var síðani í trý ár læraravikarur í Vestmanna, í Hesti og á Venjingarskúlanum í Havn.

Í 1977 fór Martin á Glyptotekets tegneskole. Árið eftir fór hann á Skolen for brugskunst og tók prógv sum teknari og grafikari í 1982.

Í 1980 fekk Martin Joensen barnabókmentavirðisløn M. A. Jacobsens fyri bókina „Per og eg", og í 1983 vann hann eina útvarpskapping við yrkingini "Ró". Annars er Martin kendur sum ein høvuðsstuðul í tónleikabólkinum Vestmenn. Hann hevur m.a. givið út trý bond: Morgun í 1986, songleikin Skuggagestir í 1991 og Blátt í støðum í 1993. Í 2006 gav Martin út bókina „Lat meg goyma teg", sum er eitt úrval av bestu yrkingum hansara. Martin Joensen myndaprýddi sjálvur bókina. Fyri Skuggagestir hevur hann fingið M.A. Jacobsens virðislønina fyri fagrar bókmentir.

Í Grønu songbók eigur Martin Joensen fleiri sangir, sum hann í flestu førum hevur gjørt lag til. Millum kendu yrkingar hansara eru „Morgun", „Eg havi tað gott" og „Kanska í dag".



*Martin Joensen framførir á Asfalt 2007*
*(Myndir: Birgir Kruse og Heini Nygaard)*

**Fløguhúsar:**







